# Ársfrágreiðing 2022

KVINNUHÚSIÐ/KREPPUMIÐSTØÐIN/KVINNUHÚSFELAGIÐ

**Innihald:**


**Síða 3 Inngangur**

**Síða 5 Hagtøl**

**Síða 5 Áheitanir**

**Siða 7 Gistingar**

**Síða 9 Búskapur**

**Síða 10 Kvinnuhúsfelagið**

## Inngangur

Kvinnuhúsið hevur heilt yvirskipað tvey ymisk tilboð til harðskapsrakt í parlagi og nærsambondum. Talan er um eina Kreppumiðstøð fyri harðskapsraktar kvinnur og evt. børn, og eina Ráðgeving. Í Ráðgevingini kunnu fólk, sum eru ella hava verið fyri harðskapi í parlagi og nærsambondum, fáa einstaklinga samrøður ella í bólki. Harðskapsraktum tørva ofta stuðul og vegleiðing, og eina gjølla greining av samansettum trupulleikum. Hetta krevur eina servitan í hjálpar- og stuðulsmøguleikum, bæði innan almenna- og privata geiran, sum t.d. innan samfelagsliga, sosiala, sálarliga og løgfrøðiliga økið. Við hjálp, vegleiðing og undirvísing kunnu harðskapsrakt fáa størri innlit í egnu støðu og teir hjálparmøguleikar, sum finnast, eins og styrki til at leggja ætlanir, at taka avgerðir, sum passa til teirra tørv og ynskir fyri framtíðina.

Hjá harðskapsraktum kann tað verða trupult at hugsa klárt, at varðveita yvirlitið, og at hava orku til at seta seg í samband við stovnar og myndugleikar. Sjálvsálitið er undir trýsti, og ofta er neyðugt at fáa hjálp til at síggja ymisku møguleikarnar, umframt stuðul til at samskipa bæði privatar og almennar loysnir.

Á Kreppumiðstøðini kunnu harðskapsraktar kvinnur, og børn teirra gista í eitt avmarkað tíðarskeið. Starvsfólk á Kreppumiðstøðini veita holla ráðgeving í samband við, hvussu kvinnan og børn hennara kunnu fóta sær víðari í lívinum, við teimum ymisku hjálparmøguleikum sum finnast.

Tað eru flest kvinnur av øðrum etniskum uppruna enn føroyskum, sum nýta Kreppumiðstøðina. Men har í móti eru tað mest føroyskar kvinnur, sum nýta Ráðgevingina og koma til ambulanta ráðgeving/samrøður.

Í november fekk Kvinnuhúsið møguleika at seta eitt fólk avtrat í starv. Hetta er í samband við, at vit miðvíst hava arbeitt við at seta eina nýggja ráðgeving á stovn, sum fer at veita ráðgeving, vegleiðing og kunning um harðskap í parlagi og nærsambondum. Hetta til kvinnur og menn. Ráðgevingin letur alment upp í 2023, men longu nú hava fleiri – bæði kvinnur og menn verið til ráðgeving. Sostatt starvast nú fýra starvsfólk/ráðgevar á Kreppumiðstøðini og í Ráðgevingini, tala er í alt um 3,5 ársverk. Harafturat hesum starvast 35 sjálvbodnar vaktir, sum taka lut í okkara vaktarskipan. Hesar eru við til at gera tað møguligt hjá kvinnum, sum eru útsettar fyri harðskapi at ringja og/ella at flyta inn á Kreppumiðstøðina alt samdøgrið.

Harðskapsraktar kvinnur eru ofta merktar av at liva í harðligum parløgum. Hetta kemur til sjóndar við, at tær ofta líða av strongd, ótta, tunglyndi og øðrum sálarligum avbjóðingum. Kvinnuhúsið hevur eisini møguleika at bjóða kvinnum, sum eru útsettar fyri harðskapi, viðtalur hjá sálarfrøðingi. Hetta tilboð er ókeypis, og fleiri kvinnur nýttu hendan møguleika í 2022.

Nógvar áheitanir hava verið í 2022, í alt 949. Av hesum hava 13 kvinnur og 11 børn gist á Kreppumiðstøðini. Gistingardøgn hjá kvinnunum var samanlagt 672 og hjá børnunum 332 døgn. Ein av orsøkinum til at talið av gistingardøgnum hevur verið so høgt er, at tað framvegis er sera

trupult at fáa nýggjan bústað, tá kvinnur, og børn teirra, eru til reiðar at flyta úr kreppumiðstøðini. Tí velja fleiri harðskapsraktar kvinnur als ikki at koma á kreppumiðstøðina, men vera verandi heima.Tað er av alstórum týdningi, at bústaðir fáast til vega til kvinnur, tá tær hava verið á kreppumiðstøðini, so tær ikki noyast aftur til eitt harðskapsrakt heim.

Kvinnuhúsið skipar vanliga fyri sjálvhjálparbólkum har kvinnur, sum eru ella hava verið útsettar fyri harðskapi hittast, deila upplivingar, finna loysnir og stuðla hvørji aðrari. Tveir ráðgevar í Kvinnuhúsinum eru við í bólkunum, og leggja lag á. Bólkarnir hittast 8-10 ferðir saman. Ongin sjálvhjálparbólkur var í 2022, men bólkur byrjar aftur á vári 2023.

**Norðurlendsk ráðstevna 2022**

Í maj mánaða skipaði Kvinnuhúsið fyri ráðstevnuni "Nordiske Kvinder Mod Vold". Høvuðsevnið var seksuellur harðskapur, og 250 luttakarir úr norðanlondum luttóku.

**Altjóða dagur móti harðskapi móti kvinnum**

Á altjóða degnum móti harðskapi móti kvinnum 25. november skipaðu Amnesty, Kvinnufelagið, Kvinnuhúsið og Sig frá/Almannamálaráðið fyri almennum fundi í Smæruni. Evnið var talgildur harðskapur. Á skránni vóru fyrilestrar og sofaprát, har millum annað tvær kvinnur, sum hava verið útsettar fyri talgildur harðskapi søgdu frá sínum upplivingum.

**Kærleikskúla frá Dugna**

Kvinnuhúsið fekk tann stóra heiður og herðaklapp at fáa tí fyrstu kærleikskúluna frá Dugna í ár, sum listamaðurin Bárður Jákupsson hevði prýtt.

**Samgonguskjalið**

Í desember varð Kvinnuhúsið beinleiðis nevnt í nýggja samgonguskjalinum. Sagt verður at ætlanin er at betra um umstøðurnar hjá Kvinnuhúsinum, og at styrkja ráðgevingina og kreppumiðstøðinga. Eisini er ætlanin at arbeiða fram ímóti at kriminalisera sálarligan harðskap. Hetta eru framstig, sum vit í Kvinnuhúsinum fegnast um.

**Tøkk til allar stuðlar**

Tøkk fyri allan stuðul, sum Kvinnuhúsið hevur fingið. Tað veri seg við samstarvi, ráðgeving, regluligari sparring, fíggjarligum stuðli og gávum. Ein stór tøkk til Føroya Landsstýri, kommunur, grunnar, felagsskapir, myndugleikar, fyritøkur og einstaklingar. Takk til miðlar og fjølmiðla fólk fyri regluliga at taka tráðin upp og varpa ljós á harðskap. Vit fegnast um at uppliva eina størri almenna tilvitsku um harðskap í parløgum og nærsambondum. Bæði tilvit og vitan um ymisku sløgini av harðskapi økist á henda hátt í samfelagnum.
Tøkk til okkara sjálvbodnu kvinnur, sum taka eina serliga ábyrgd og hond um aðrar kvinnur og børn teirra, ið hava upplivað ella livað við harðskapi.
Eisini ein tøkk til politiskt uppmerksemi og vælvild, og at Kvinnuhúsið verður tikið við, tá íð átøk eru, sum arbeiða fyri at betra møguleikarnar hjá vaksnum og børnum, ið hava verið fyri harðskapi í parlagi og nærsambondum.

## Hagtøl:

Fyri at skjalprógva tørvin á Kvinnuhúsinum og Kreppumiðstøðini, hava vit síðan fyrstu áheitan í 1990 ført hagtøl. Hagtøl verða skjalfest yvir allar áheitanir til Kvinnuhúsið. Hesi eru navnleys, og kunnu ikki nýtast til at kenna persónar aftur, ið stenda aftanfyri áheitanina. Tølini snúgva seg um vaksin, um ikki annað er upplýst.
Áheitanirnar eru úr nærum øllum kommunum í Føroyum. Á hvørjum ári eru nakrar áheitanir úr útlondum.

**Áheitanir í 2022:**
Í 2022 vóru tilsamans 949 áheitanir. Av teimum 949 áheitanunum snúðu 523 seg um m.a. samstarv, fyrispurningar, uppgávur/verkætlanir, miðlar og vitjanir. Hinar 426 snúgva seg um harðskap. Av hesum eru 421 áheitanir frá kvinnum og 5 áheitanir frá monnum. Tað er oftast, at tað er tann harðskapsrakti sjálvur, ið vendir sær til okkara. Í summum førum eru tað onnur; Almannaverkið (2), lækni (6), løgreglan (2), sálarfrøðingur (4) ella familja/vinir/arbeiðspláss (48).

Niðanfyristandandi hagtøl byggja á tær 426 áheitaninar frá harðskapsraktum, útsett fyri harðskapi, ið ynsktu at gera brúk av teimum tilboðum Kvinnuhúsið/Kreppumiðstøðin bjóðar.

| | |
|---|---|
| 242 | áheitanir úr bý |
| 017 | áheitanir av bygd |
| 008 | áheitanir úr útlondum |
| 159 | áheitanir vóru ikki upplýstar |

**Orsøk til áheitanina:**
Sama persónur kann hava vent sær við fleiri trupulleikum, tí samsvarar talið av áheitanum ikki við talið av orsøkum.

| | |
|---|---|
| 107 skyldast | Likamligan harðskap |
| 326 | Sálarligan harðskap |
| 182 | Hóttanir um harðskap |
| 048 | Fíggjarligur harðskapur |
| 053 | Materiellur harðskapur |
| 014 | Annar harðskapur (t.d. útleigari, arbeiðsgevari o.o.) |
| 083 | Stalking |
| 035 | Kynsligur ágangur / blóðskemd |
| 007 | Neyðtøka |
| 001 | Fosturtøka |
| 179 | Sálarligir trupulleikar |
| 171 | Ótrúskapur |
| 192 | Rúsmisnýtsla |
| 010 | Separatión |
| 002 | Hjúnaskilnaður |

| | |
|---|---|
| 001 | Konupeningur |
| 003 | Barnapeningur |
| 025 | Foreldramyndugleiki |
| 028 | Samverurættur |
| 004 | Búskapur |
| 019 | Bústaðarviðurskifti |
| 002 | Skifti |
| 052 | Ymisk mentan |

**Úrslit av áheitanini:**
Kvinnuhúsið bjóðar, umframt samrøður við harðskapsrakt um harðskap, upplivingar í parlagnum, eisini ráðgeving og vegleiðing, um tey meira praktisku og búskaparligu viðurskiftini. Vit kunnu veita holla ráð- og vegleiðing í samband við, hvussu kvinna og børn hennara koma víðari og megna at fóta sær. Starvsfólkini í Kvinnuhúsinum hava ein virkan leiklut at samskipa samstarvið við privatar og almennar stovnar og myndugleikar. Almannaverkið, Rættarhjálp Føroya, løgfrøðingar, Familjufyrisiting, peningastovnar, Útlendingastovu, Barnarverndartænastu, løgreglu, læknar ella viðgerðarstovnar. Alt so kvinnan gerst betri før fyri at kunna seg um teir møguleikar, sum eru, og leggja ætlanir og taka avgerðir, sum passa júst til hennara tørv og ynskir fyri framman.

**Aldurin á kvinnunum:**

| | | |
|---|---|---|
| 001 | | Yngri enn 18 |
| 005 | millum | 18 – 19 ár |
| 058 | | 20 – 29 ár |
| 079 | | 30 – 39 ár |
| 109 | | 40 – 49 ár |
| 043 | | 50 – 59 ár |
| 014 | | 60 ár og eldri |
| 112 | | Ikki upplýst |

**Aldurin á monnunum:**

| | |
|---|---|
| 005 | 30 – 39 ár |

**Børn:**
Tær 421 kvinnurnar høvdu tilsamans 529 børn.
Aldurin á børnunum:

| | | |
|---|---|---|
| 077 | millum | 00 – 02 ár |
| 086 | | 03 – 06 ár |
| 068 | | 07 – 10 ár |
| 027 | | 11 – 14 ár |
| 054 | | 15 – 18 ár |
| 182 | | Yvir 18 ár |

| | |
|---|---|
| 035 | Ikki upplýst |

**Tann, ið fremur harðskapin:**

| | |
|---|---|
| 143 | Makin |
| 108 | Fyrrverandi makin |
| 009 | Foreldur, systkin ella børn |
| 023 | Onnur |
| 138 | Ikki upplýst |

## Gistingar:

13 kvinnur og 11 børn hava gist á Kreppumiðstøðini í 2022. Av hesum gistu 5 kvinnur fyri fyrstu ferð, 1 fyri aðru ferð og 2 fyri triði ferð ella meira. Ikki upplýst 5.

**Gistingardøgn (vaksin + børn):**

Kvinnur og børn hava gist á Kreppumiðstøðini í tilsamans 1003 samdøgur.

| | |
|---|---|
| 04 kvinnur | 01 – 07 samdøgur |
| 01 | 07 – 14 samdøgur |
| 01 | 14 – 28 samdøgur |
| 04 | 30 – 60 samdøgur |
| 03 | yvir 60 samdøgur |

**Aldur:**

Kvinnurnar vóru í aldursbólkunum frá 20 – 60 ár og eldri.

| | |
|---|---|
| 03 millum | 20 – 29 ár |
| 05 | 30 – 39 ár |
| 04 | 40 – 40 ár |
| 00 | 50 – 59 ár |
| 01 | 60 ár og eldri |

**Aldur á børnunum:**

Børnini vóru millum 3 og 14 ár.

| | |
|---|---|
| 00 millum | 00 – 03 ár |
| 07 | 03 – 06 ár |
| 03 | 07 – 10 ár |
| 01 | 11 – 14 ár |

Tað eru oftast tey smæstu børnini, ið gista saman við mammuni. Kvinnurnar gjalda 50 kr. fyri gisting pr. samdøgur. Haraftrat skulu tær sjálvar keypa og gjalda fyri mat.

**Flyting av Kreppumiðstøðini:**

| | |
|---|---|
| 03 | til nýggjan búðstað |
| 02 | til foreldur |
| 02 | á viðgerðarstovn |
| 06 | annað |

**Harðskapurin:**

| | |
|---|---|
| 06 kvinnur | hava verið fyri likamligum harðskapi |
| 12 | hava verið fyri sálarligum harðskapi |
| 11 | hava verið fyri hóttanum |
| 04 | fíggjarligum harðskapi |
| 01 | materiellum harðskapi |
| 03 | stalking |
| 01 | kynsligur ágangur ella blóðskemd |

**Melda til løgregluna:**

| | |
|---|---|
| 02 | fóru ikki at melda |
| 02 | vildu melda |
| 09 | ikki upplýst |

**Orsøk til harðskapin:**

Kvinnurnar siga, at orsøkin til at maðurin fremur harðskap er:

| | |
|---|---|
| 01 | partvís uppvøkstur |
| 01 | ástarøvund |
| 01 | undirlutakenslur |
| 02 | misnýtsla |
| 06 | ymisk mentan |
| 02 | ikki upplýst |

**Maðurin, ið fremur harðskap:**

Mennirnir eru úr øllum samfelagsstættum og finnast í øllum aldursbólkum.

| | |
|---|---|
| 07 | hjúnafelagi/sambúgvi/unnusti |
| 04 | fyrrverandi hjúnafelagi/sambúgvi/unnusti |
| 02 | annar (foreldur, systkin ella børn) |

## Búskapur

## Kvinnuhúsgrunnurin:

| | |
|---|---|
| Inntøkur: | Kr. 2.198.508 (Landstýri, kommunur, gisting og annar stuðul) |
| Útreiðslur: | Kr. 2.098.549 (Kreppumiðstøðin, rentir og granskoðan) |
| Eginpening.: | Kr. 3.732.058 (Uppsparing til hús) |

**Kvinnuhúsið/Kreppumiðstøðin: 2022**

| | |
|---|---|
| Inntøka: | Kr. 3.112.996 (Grunnurin, gávur og NKMV ráðstevnan) |
| Útreiðslur: | Kr. 2.780.262 |

Kreppumiðstøðin leggur rakstarætlan fyri komandi ár fram fyri Grunnin. Síðani játtar Kvinnuhúsgrunnurin pening til rakstur av Kreppumiðstøðini.

## Kvinnuhúsfelagið:

**Limafundir:**
Sjálvbodnu vaktirnar hava høvi at hittast, samskifta, geva og fáa íblástur. Á limafundunum hava umboð fyri Kvinnuhúsið framløgur. Eisini verða einstaklingar, stovnar ella myndugleikar bodnir at greiða frá evnum, sum hava markamót til harðskapsfakliga økið.

**Konuveitslan:**
29. januar fyllir Kvinnuhúsfelagið ár. Í hesum sambandi bjóðaði felagið sjálvbodnu vaktunum ein góðan bita á Hotel Hilton. Hetta er ein tøkk fyri ólønta arbeiðið.

## Tær sjálvbodnu:

**Arbeiðsbýti:**

| | |
|---|---|
| 35 | náttar- og vikuskiftisvaktir |
| 05 | nevndin í felagnum + 2 eykalimir |
| 03 | nevndin í grunninum |

Arbeiðsøkið er býtt millum 35 kvinnur. Hesar eru býttar í 5 bólkar, 7 vaktir í hvørjum bólki. Hetta ger, at man sum sjálvboðin hevur eina forvakt og eina bakvakt 5. hvørja viku. Á henda hátt eru altíð tvær kvinnur á vakt alt samdøgrið

Okkara upplýsingar vísa, at sjálvbodnu vaktirnar, í allarflestu førum, eru kvinnur, ið eru virknar á arbeiðsmarknaðinum.

**Arbeiðstímar:**

| | |
|---|---|
| 10.950 | náttarvakt (15 t. x 365 dg. x 2) |
| 01.116 | vikuskiftis- og høgtíðsvakt (9 t. x 62 dg. x 2) |
| 00.288 | limafundir (2 t. x 8 mðr. x 18 pers.) |
| 00.210 | nevndarfundir (3 t. x 10 mðr. x 7 pers.) |
| 00.024 | grunnurin (2 t. x 4 fund x 3 pers.) |
| **12.588 t.** | **í alt** |

Tlf. 317200 – post@kvinnuhusid.fo – www. kvinnuhusid.fo – Kvinnuhúsið er á Facebook og Instagram